# Ráur harðskapur

**HARÐSKAPUR** Ein 21 ára gamal maður varð í Føroya rætti leygardagin varðhaldsfongslaður í 13 dagar, skuldsettur fyri ráan harðskap

Randi Jacobsen

Ein 19 ára gamal drongur varð leygarmorgunin illa hagreiddur í Steinatúni í Havn. Hann varð sligin og sparkaður av einum øðrum manni, og hann fekk millum annað tann skaða, at hann misti fleiri tenn.

Fleiri vitni vóru til tilburðin, og tey kundu siga politinum, hvør maðurin var, sum hevði lopið á.

Klokkan hálvgum níggju varð hesin 21 ára gamli maðurin handtikin, og klokkan hálvgum tólv leygardagin varð hann settur fyri grundlógarhoyr í Føroya rætti.

Maðurin, sum noktaði seg sekan, varð varðhaldsfongslaður í 13 dagar. Tað varð gjørt, tí maðurin hevur áður verið harðligur, og í apríl fekk hann ein treytaðan dóm fyri harðskap.

Politið heldur ikki, at álopsmaðurin var ávirkaður av øðrum enn rúsdrekka.

Annars var nógv politi í Havnar gøtum leygarnáttina. Klokkan hálvgum fýra fóru fleiri politistar út at ganga í gøtunum, og tað gjørdi, at fleiri bardagar vórðu steðgaðir, áðrenn nakað álvarsligt hendi. Nøkur fólk fingu bót fyri brot á politiviðtøkurnar.

Leygarkvøldið var púra friðarligt.



# Ungir menn fingu stóran hemara

**HEMARI** Tá tríggir ungir menn fóru at hyggja eftir seyði sunnukvøldið, sóu teir ein hemara, sum gekk uppi í sjónum. Teir egndu makrel á ein húk, sum var festur í weirteym og fingu ein hemaran, sum vigaði 207 pund



**ORDANS FONGUR**

*Bjartur Tórhalsson, John Martin Andreasen og Brandur Isaksen við hemaranum, sum teir fingu norðarliga í Vestmannasundi sunnukvøldið*

Mynd: Sólbjørn Olsen

Vilmund Jacobsen

Eftir venjing sunnukvøldið, fóru tríggir ungir menn, sum rógva við kappróðrarbátinum Kvívíkingi, í glastrevjabátin Liljan at hyggja eftir seyði í Skorunum í Vestmanna. Menninir vóru Brandur Isaksen, sum saman við pápa sínum eigur bátin, John Martin Andreasen og Bjartur Tórhalsson.

Bjartur sigur, at ætlanin var slett ikki at fara at fiska í gjárkvøldið, men tá teir komu nakað norður í Vestmannasund, sóu teir ein hemara í vatnskorpuni.

– Vit hava allir tríggir roynt eftir hemara áður, men hava ongantíð fingið nakran. Í bátinum var hemarahúkur, sum var festur í ein teym úr weiri. Vit egndu makrel á húkin, og hemarin tók.

Teymurin hevði bert eina stóra teymalongd, men síðan høvdu teir knýtt endan á teyminum upp í ein standara, sum síðan var festur í eina boyu. Úr boyuni høvdu teir so aftur ein standara í bátin.

## Setti nógv á

– Í fyrstuni, tá hemarin hevði tikið, visti hann helst ikki av, at hann var fastur. Men tá hann fann út av, at hann var fastur í teyminum, leikaði hann øgiligt í og setti nógv á. Hann fór undir við boyuni, og eg haldi, at hann mundi hava boyuna undir í eitt korter ella so. Samstundis hálaði hann einar 30-40 favnar av standara úr bátinum.

Bjartur Tórhalsson sigur, at hetta var ein ógvuliga spennandi løta, og tað mundi taka teimum umleið ein hálvan tíma at fáa lívið av hemaranum.

Hann sigur, at tað eydnaðist teimum trimum at fáa stóra og tunga fiskin inn á dekkið á bátinum.

– Vóru vit ikki fleiri, høvdu vit ikki fingið hann inn í bátin, sigur Bjartur Tórhalsson.

## 207 pund

Hemarin, sum hesir tríggir ungu menninir í bátinum Liljan fingu sunnukvøldið, vigaði 207 pund.

Teir kruvdu fiskin beinanvegin sunnukvøldið og løgdu hann í ís.

Ætlandi verður hemarin seldur um uppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya.

Vanliga verður sagt, at besta tíðin til hemara er um veturin, men ávísa tíð um summarið kann fiskurin eisini veiðast kring oyggjarnar.

*vilmund@sosialurin.fo*